

## Rumenar forfylgdir

Í Norðurírlandi hava myndugleikarnir gjørt av at rinda ferðaseðlarnar hjá 100 rumenum, sum hava verið fyri rasistiskum ágangi í norðurírska høvuðsstaðnum Belfast, og sum tí vilja sleppa burtur haðani. Tey 100 fólkibi noyddust at flýggja frá húsi og heimi og hava hildið til í einari kirkju í Belfast. Men eftir at ófriðarkroppar hava gjørt seg inn á kirkjuna, hava mynmdugleikarnir valt at hjálpa teimum forfylgdu av landinum við at rinda flogferðina til Rumenia. 25 eru longu farin, og 75 hava tikið av tilboðnum frá myndugleikunum. 17 hava harafturímóti gjørt av, at tey fara ongan veg.



*Eldborg er eitt framkomið supply-skip, og byggikostnaðurin liggur um 240 miljónir krónur*

Byggikostnaðurin liggur um 240 miljónir krónur. Seinni skrokkurin hjá leirvíkingum er smíðaður í Portugál, og hin triði er eisini smíðaður í Turkalandi. Byggikostnaðurin fyri skipið, sum ætlandi kemur til heystar, fer at liggja um 285 miljónir norskar krónur.

Orsøkin til, at Eldborg ikki kemur á Leirvík, hagar Sjóborg gjøgnum árini er komin við fleiri nýbygningum, er í stuttum, at skipið er ov stórt til tess. Longdin liggur um 80 metrar og breiddin um slakar 18 metrar.

Skipað verður tí fyri stórari móttøku í Havn leygardagin klokkan 14, tá skipið kemur. Almenningurin verður boðin umborð, og seinni um dagin verður døgurði fyri innbodnum.

Skiparar við Eldborg verða Jan Kristoffersen og Einar Vang, báðir úr Havn.

Skipið er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini (FAS).



*Skiparar við Eldborg verða Jan Kristoffersen og Einar Vang, báðir úr Havn.*



*Fyri aðru ferð í fáar mánaðar er Fiskiveiðieftirlitið komið fram á Hamranes og Beiðanes, sum hava fiskað á stongdum øki undir Føroyum. Hesaferð metir eftirlitið, at reiðskapurin hjá skipunum eisini er ólógligur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Hvalbiartrolararnir eru tiknir fyri aðru ferð í ár

**Hamranes og Breiðanes eru nú tiknir tvær ferðir í ár fyri ólógliga fiskiveiði, og hesaferð vóru skipini bæði á stongdari leið og verða skuldsett fyri ólógligan fiskireiðskap**

VAKTARHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hvalbiartrolarar hava gjøgnum fleiri ár verið óførir at fiska. Tað eru teir kendir fyri. Eisini nýggjastu skipini, Hamranes og Breiðanes, sum eru fyrrverandi Polarhav og Stjørnan, hava riggað væl, síðan suðuroyingar keypti skipini frá Føroya Banka. Hetta fegnast øll um. Tað er positivt, tá skip, sum eru farin um tvingsilssølu, tí tey ikki fingu raksturin at hanga saman, verða seld útaftur, og aðrir fáa samanhang í veiði og rakstur.

Hetta er eisini positiva síðan á medaljuni hjá Hamranesi og Breiðanesi, sum nú eru heimahoyrandi í Hvalba.

Á hinari síðuni kemur, at júst hesi skip nú fyri aðru ferð í fáar mánaðir eru tikin fyri ólógliga fiskiveiði í føroyskum sjógvi.

Um midnáttarleitið í gjár kom Brimil á Havnina við skipunum, tí tey høvdu fiskað á eini stongdari leið, rópt F, suður av Munkagrunninum. Hetta er ein leið, sum er stongd fyri trolveiði alt árið.

Tá Sosialurin tosaði við Brimil um middagsleitið í dag, søgdu teir, at illgruni eisini er um, at hvalbiartolararnir – umframt at fiska á stongdari leið – eisini fiskaðu við ólógligum trolreiðskapi, og sum skilt verður hetta partur av ákæruni móti skiparunum.

Væntandi er, at sektaruppskot fyri hesi brot verður lagt fyri skipararnar seinnapartin í dag.

Tað eru bert fáir mánaðir, síðan júst hesi bæði skipini vórðu tikin fyri ólógliga veiði á øki, sum varð stongd eftir kunngerðini um ungfisk. Sambært útvarpinum hjá Kringvarpinum á middegi í dag, høvdu skipararnir tá eisini sløkt tólini sum siga, hvar skipini eru.

Sum skilst, er fyrra málið ikki endaliga avgreitt enn – og enn minni hetta seinna málið, sum er so spildurnýtt.

Á Fiskiveiðieftirlitinum siga tey, at tá skip soleiðis verða tikin fyri ólógliga veiði, verður málið latið fútanum, sum tekur sær av hesum. Manningin umborð á Brimli er tó partur í slíkum máli, til tað er endaliga avgreitt, tí hesir menn eru jú hin parturin í slíkari sak.

Vit hava áður hoyrt um, at skip kunnu missa veiðiloyvi í nakrar vikur, tá tey verða tikin, men hetta hevur serliga verið praktiserað, tá tey ikki hava yvirhildið fráboðanarskylduna um smáfisk.

Kemur Fiskiveiðieftirlitið soleiðis fram á skip, sum hava ov nógv av smáfiski í lastini, og tey ikki hava boðað frá hesum sambært galdandi reglum, kann Fiskiveiðieftirlitið taka veiðiloyvi frá skipunum í ávísa tíð.